FÍF hevur avgjørt at skipa ein úrvælsbólk av íðkarum, sum fáa stuðul til at fara uttanlanda at kappast, hettar fyri at eggja okkara fram komnu íðkarum, at seta sær enn hægri mál.
Avgjørt er at stuðla við upp til kr. 5.000 um árið, til tann sum klárar settu krøvini. Krøvini eru í fyrstalagi 700 stig á stigatalvuni hjá IAAF og í øðrum lagi eitt miðal av úrslitinum, ið góvu bronsumerki á trimun undanfarnu oyggjaleikum. Tað gevur fylgjandi krøv:

| **Kvinnur** | **Grein** | **Menn** |
|---|---|---|
| 14,17 | 100 | 11,59 |
| 29,62 | 200 | 23,92 |
| 1,06,58 | 400 | 53,51 |
| 2,28,73 | 800 | 2,02,94 |
| 5,11,44 | 1500 | 4,13,79 |
| 19,30,95 | 5.000 | 15,38,02 |
| 41,17,92 | 10.000 | 33,16,77 |
| 41,35 | 10 km. | 33,19 |
| 1,30,42 | 21,1 km. | 1,16,11 |
| 3,16,36 | 42,2 km. | 2,47,53 |
| 17,06 | 110/100 f | 16,28 |
| 1,12,06 | 400 f | 59,92 |
| 13,02,60 | 3.000 f | 10,17,92 |
| 4,65 | Longdarlop | 5,95 |
| 10,15 | Trístøkk | 12,73 |
| 1,54 | Hæddarlop | 1,83 |
| 3,36 | Stonglop | 4,07 |
| 36,13 | Spjótkast | 53,93 |
| 11,16 | Kúlustoyt | 12,99 |
| 39,09 | Hamarkast | 48,68 |
| 35,74 | Klingruvarp | 41,37 |

Harafturat skal íðkarin:
- vera limur í felagi undir FÍF
- vera fyltur 18 ár
- venja frælsan ítrótt miðvíst
- vera sjónligur í kappiningum, sum eru í Føroyum

Tað er upp til feløgini at gera úttøkuleiðaran varugan við íðkarar, ið eiga at verða havdir í huga. Íðkarin ger av í samráð við útøkuleiðarin hvat stuðulin skal brúkast til, annahvørt kapping uttanlanda ella venjingarlegu, íðkarin skal eftir ferðina greiða úttøkuleiðarnum frá hvussu ferðin gekst.
Stuðulin fellir burtur um hann ikki er brúktur áðrenn 8 mánaðar eftir, at kravið er klárað, undantak kann vera gjørt í samráð við útøkuleiðaran.
Stuðulin kann vera frátikin um íðkari sýnir ósømuligan atburð. Slíkt mál skal fyri nevndarfund hjá FÍF áðrenn avgerð verður tikin.

Úttøkuleiðarin er: Niels Jákup Jakobsen – Fartlf.: 545194 – Tpost: nielsj@elektron.fo

01.05.2010